LM-099/2023

**Annika Petersen**

Fylgiskjal 37

**Fra:** Randi Meitil <randimeitil@gmail.com>
**Sendt:** 22. februar 2024 13:36
**Til:** VMR-Journal
**Emne:** viðmerkingar til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu

Góðu tit í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Kunnu tit senda mær eina váttan fyri at tit hava fingið mínar viðmerkingar til lógaruppskotið?

Her eru mínar viðmerkingar til lógaruppskotið hjá Høgna Hoydal um burðardygga ferðavinnu í Føroyum. Tað er gleðiligt at eitt uppskot endiliga fyriliggur. Vit hava bíðað leingi eftir at okkurt skuldi henda. Eg havi lisið uppskotið væl ígjøgnum og aftaná at hava grundað um hetta eina tíð eri eg komin til hesar viðmerkingarnar.

Tað er týdningarmikið at minna seg á at eitt festi gevur rætt til at hava seyð og ikki so nógv annað. Til at dríva ferðavinnu krevjast aðrir førleikar. Tað verið seg málsligir, vitan osv. Treytirnar eru eisini aðrar enn til at hava seyð. Trygdin má vera í hásæti t.d.

Eg helli til at umhvørvisgjaldið, sum øll ferðandi skulu gjalda fyri at koma til Føroya, fer í ein grunn. Síðani kunnu bøndur og óðalsfólk søkja um pening hagani til ávísar verkætlanir, sum hava við ferðavinnu at gera, so sum at gera gøtur etc. Um tað er ein trupulleiki at umsitingin av einum slíkum grunni er í Havn, so er bara leggja hana uttan fyri miðøkið t.d. í Funningi, Hvannasundi ella Sandvík. Eisini kundi verið sett eitt fólk at hjálpa umsøkjarum at skriva umsøkn um tað skuldi víst seg at verið ov møtimikið hjá umsøkjarunum at skriva umsøkn.

Tað er av alstórum týdningi fyri trygdina at krøv og treytir verða sett. Og eftirlit má vera við at trygdin er í hásæti. Eg ivist í um komunurnar skulu hava hetta eftirlitið. Eg helli meira til at landsmyndugleiki hevur tað. Eg síggi fleiri staðni, har ferðafólk skulu gjalda hagagjald at onki eftirlit er við at trygdin er í lagið. Og trygdin er als ikki í lagið í dag. Tað síggi eg við mínum egnu eygum í mínum arbeiði sum ferðaleiðari. Eg gangi nógv í haganum við ferðafólki.

Eg haldi tískil ikki at tað tænir endamálinum um at tað skal vera trygt hjá øllum at ferðast í haganum at peningurin, sum kemur inn við obligatoriska umhvørvisgjaldinum verður deildur í trý millum kommunur, bygdir og jarðarumsitarar, uttan at har fylgjar treytir og krøv við.

Eg haldi tað er fínt at tað framhaldandi skal vera frítt at ganga eftir varðagøtunum og at man skal boða jarðarumsitarum frá um ein ætlar sær út um varðagøturnar.

Eg meini at krav skal vera um føroyskan ferðaleiðara. Hetta borgar fyri trygdini, kvaliteti og burðardygd. Eisini gevur hetta nógv meira meining, tá vit hyggja at tí samfelagsbúskaparliga. Vit útbúgva ferðaleiðarar í Vestmanna í hópatali og tað eru tey og hinir ferðaleiðararnir, sum skulu arbeiða sum ferðaleiðarar í Føroyum.
Eg haldi ikki at vit skulu innrætta okkara land soleiðis at fremmandir ferðaleiðarar lættliga kunnu koma og taka arbeiðið frá okkum. Ynskiligt er at tað frá almennari síðu verður gjørt nakað fyri at forða fyri hesum. Í løtuni verður onki gjørt fyri at forða fyri tí. Tað er keðiligt at vera vitni til.

Tá eg eri saman við ferðafólkunum, práta vit eisini um gongugjaldið. Tað er ymiskt, hvat tey halda um tað. Summi eru rasandi um tað. Onnur halda tað vera ok, men átti ikki at verið so høgt. Har tað kostar 200dkr, hevði tað verið meiri hóskandi við 70dkr. Tey kenna problematikkin frá teirra egna landi. Til dømis var ein írsk, sum nokk var sakførari, sum segði at problemið var loyst í Írlandi, tá tað fyrsta ferðafólkið datt og meldaði jarðareigaran, sum hevði tikið eitt gongugjald. Eftir hetta vildi jarðareigarnir ikki hava nakað við hagagjald at gera góvu ábyrgdina fyri ferðavinnuni yvir til landið. Vónandi koma vit ikki út í slíka støðu.

Í vón um at tit finna eina skilagóð loysn á hesum okkara landið at frama.

Randi Meitil

LM-099/2023

phone: +298 28 98 18
www.faroetrekking.com
instagram: faroetrekking